ítróttur

Nr. 166 • fríggjadagur • 2. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Julian ivaðist ikki

**Nýggi HB-venjarin, Julian Hansen, ivaðist ikki í at taka av, tá ið leiðslan í HB spurdi, um hann vildi taka sær av besta liði fel-agsins, tað ið eftir er av kappingarárinum**

VENJARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Julian Hansen eygleiðir leikararnar undir venjingini mikukvøldið. Leikarin á myndini er Uni Arge, sum er einasti leikarin í HB-hópinum, sum Julian sjálvur hevur spælt saman við.*
*Mynd: Terji Nielsen*

Mikukvøldið var fyrsta venjingin hjá besta liðnum hjá HB undir nýggja venjaranum, Julian Hansen. At bæði leikarar og fólk kring HB vóru spent upp á at síggja nýggja venjaran, sást týðuligani, tí heilt fitt av ídnastu HB-fjepparunum høvdu lagt leiðina niðan í Gundadal til fyrstu venjingina hjá Julian.

### Aftur til røturnar

Julian Hansen hevur búð í Danmark í nógv ár, og hann hevur fleiri ferðir staðið á odda fyri besta liðnum hjá ÍF Føroyum. Fótbóltsrøturnar hevur Julian annars í HB, har gjøgnum øll áttatiárini var fastur fúsur á besta liðnum. Julian var eitt skifti í 1997 eisini hjálparvenjari hjá HB.

Tað kom eitt sindur óvart á Julian, tá ið hann fekk fyrispurningin frá leiðsluni í HB um venjarastarvið:

- Tað hevði als ikki væntað, og eg taki tað sum eitt herðaklapp, at teir hugsaðu um meg, tá ið teir skuldu finna nýggjan venjara, sigur Julian Hansen.

Sjálvur sigur Julian, at tá ið hann fekk fyrispurningin frá HB, ivaðist hann ikki, tí tað hevur altíð verið ein dreymur hjá sær at verið venjari hjá besta liðnum hjá barndómsfelagnum.

### Óttast ikki heita sessin

At hann tekur við eftir ein venjara, sum júst er koyrdur frá, er ikki nakað, sum Julian Hansen hugsar um, nú hann er farin undir venjingarnar.

- Eg hugsi ikki um tað, sum er farið, tí tað hevur sum so einki við meg at gera. Mítt fokus er upp á uppgávuna, sum liggur fyri framman, og hvussu hon verður loyst best. Eg veit væl, at hetta ivaleyst er heitasti venjarasessurin í Føroyum, men tað kann eg liva við, sigur Julian Hansen.

Eftir fyrstu venjingina við hópinum mikukvøldið helt Julian, at talan var um nógvar øgiliga ágrýtnar spælarar, men hann hevði eisini sæð nøkur grundleggjandi ting, ið hann saman við spælarunum skal arbeiða við.

Spurdur um tað er nøkur serstøk spælskipan, ið honum dámar fram um aðrar, og um tað er væntandi, at HB fer at nýta ein aðra spælskipan, nú hann hevur tikið við venjarastarvinum, sigur Julian Hansen:

- Tað ber ikki til at siga. Mín hugsjón er tann, at tað er spælaratilfarið, ið ger av, hvør spælskipan verður nýtt, og tí vil eg ikki læsa meg fastan í nakra skipan, uttan at kenna spælararnar nóg væl, sigur hann.

Julian Hansen er útbúgvin sosialpedagog, og hann starvast til dagligt við menningartarnaðum børnum í Danmark. Men skuldi tað hent seg, at HB bjóðaði honum venjarastarvið komandi ár, er tað ikki óhugsandi, at hann hevði tikið av, og saman við familjuni flutt til Føroya.

- Eg havi sjálvsagt arbeiði, børn, sum ganga í skúla, og hús, men eg dugi tó væl at ímynda mær at verið í Føroyum í eitt ár og arbeitt sum venjari, um tey praktisku tingini vóru í lagi, sigur Julian Hansen at enda.

# Tyrlan varð eisini nýtt

**Hóast allir funnu vegin fram, so var tað ymiskt, hvussu landsliðsspælararnir høvdu valt at ferðast til flogvøllin, tá landsliðið skuldi avstað**

LANDSLIÐSFERÐ
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Vágar:** Tá landsliðsboð verða givin føroyskum spælarum, er tað aloftast so, spælararnir fáa boð um, nær teir skulu vera á flogvøllinum í Vágum, og er tað í aðrar mátar upp til spælararnar sjálvar, júst hvussu teir koma somikið langt.

Á tann hátt var einki broytt mikudagin, men tað var tó ymiskt, hvussu spælararnir høvdu valt at koma til flogvøllin.

Beint áðrenn hálvgum trý, tá liðið skuldi møtast, kom ein av spælarunum - Heðin á Lakjuni - soleiðis við tyrluni. Ein ferð, sum spælarin sjálvur helt vera munandi meira ómaksleysa, enn um hann skuldi farið vanliga túrin við bili og Strandferðsluni.

- Tað passaði so væl við ferðaætlanini hjá tyrluni hesaferð. Tað sparir jú nógva tíð, og saman við fleiri av áskoðarunum, sum eisini eru í ferðalagnum, valdi eg tí at taka tyrluna til flogvøllin. Og tað gekk jú eisini fínt, staðfesti hann.

### Við taxa

Eisini Óli Johannesen hevði gjørt nýtslu av tyrluni á ferðini, men hjá honum gekk tó ikki heilt so væl.

Landsliðsskiparin hevði nevnliga lagt ferðina soleiðis, at hann kom við tyrlu av Tvøroyri og til Havnar, og síðani skuldi ein bilur standa fyri honum, soleiðis at hann slapp beina leið yvir á farstøðina, haðani hann við bussi skuldi á flogvøllin.

Einhvør misskiljing var tó íkomin, og eingin taxabilur stóð fyri honum, tá tyrlan settist á Boðanesi. Tað bar við sær, at bussurin koyrdi av Farstøðini uttan Óla Johannesen, og so vóru góð ráð dýr. Endin varð tó, at taxa-bilur slapp at koyra teinin vestur, soleiðis at eisini Óli Johannesen var við, tá spælararnir vórðu kekkaðir inn hjá Atlantic Airways.



*Heðin á Lakjuni helt, at tá ferðaætlanin hjá tyrluni nú passaði so væl, so var tað munandi lættari at ferðast við hesari, heldur enn fara við skipi og bili*

Tað skal eisini leggjast afturat, at hóast hættirnir soleiðis vóru ymiskir hjá fleiri av spælarunum, so eydnaðist tað tó øllum at koma fram í øllum góðum.